## Atli misti á stokkinum

Danska felagið Frem spældi í gjár ímóti Silkeborg í næstbestu deildini. Silkeborg flutti niður í Superliguni í summar, og teir vunnu eisini dystin í Valby í gjár. Frem var aftanfyri bæði 0-1 og 1-2, men báðu ferð megnaðu teir at javna. Fimm minuttir fyri tíð gjørdi Silkeborg tó eitt mál afturat, og so vunnu teir 3-2. Atli Danielsen spældi á miðvøllinum hjá Frem, men hann varð skiftur út eitt korter fyri tíð, tá ið støðan var 2-2.



## Gongur strúkandi hjá Vejle

Vejle hevur fingið góða byrjan í næstbestu donsku fótbóltsdeildini. Í summar flutti Vejle úr Superliguni og niður í næstbestu deildina, men jútska felagið hevur sett beina kós ímóti superliguni aftur. Sunnudagin spældi Vejle fjórða dystin í 1. deild, og fyri fjórðu ferð vunnu teir – hesaferð 5-3 ímóti Hvidovre. Ein av spælarunum hjá Vejle er fyrrverandi NSÍ-spælarin Ulrik Balling, men hann spældi ikki við um vikuskiftið.

B71-NSÍ 1-3 (0-1):

# NSÍ og yvirtíðin eru í parti á Sandi

**Christian Høgni Jacobsen syrgdi við fínum máli fyri tí, sum hann í summar varð fingin aftur til barndómsfelagið at gera**

*B71*

*NSÍ*

FÓTBÓLTUR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað var sera gott lag í NSÍ leguni, tá ið 23. maðurin á vøllinum fyri síðstu ferð hevði blást í Traðardali sunnudagin. Eftir nógv stríð hevði NSÍ við 3-1 sigri tryggjað sær gott útgangsstøði undan toppbrakinum um eina viku, tá ið B36 fer at vitja við Løkin.

Ikki minst hevði tað stóran týdning, at oddaliðið megnaði at reisa seg eftir óvæntaðu heimatapið ímóti Skála næstsíðsta umfar. Johan Nielsen plagar at spæla við sama liðnum mest sum hvørja ferð. Hesa ferð hevði hann umskipað verjuna eitt sindur, og tað eydnaðist.

At NSÍ fór av Sandi við øllum stigunum ber mót og dirvi við sær, og harvið eru fyritreytirnar undan oddabrakinum og stríðnum um FM heitið so góðar, sum tær kunnu vera.

Tað stóð nógv á, men tað eydnaðist hjá NSÍ, og síðstu løtuna sást, hvør munurin er á oddaliði, sum hevur støra breidd, og á uppflytaraliði, sum stríðist fyri at spæla ungar menn inn á liðið, og sum er rættuliga sárbært yvirfyri leikbannum.

Tá ið mest stóð á, spenti NSÍ álopsbogan, og hann helt. Í summarsteðginum varð Christian Høgni Jacobsen fingin inn aftur til Runavíkar eftir HB útferð fyrrapartin av kappingarárinum. Setningurin hjá Christian Høgna er at skjóta málini, sum skulu til fyri at vinna stigini, ið eru neyðug, um fyrsta FM heitið nakrantíð skal vinnast til Runavíkar.

Tá ið tað bara restaði ein lítil løta, gjørdi landsliðsmaðurin tað, sum tað verður roknað við, at hann skal gera, og sum hann í fleiri ár í NSÍ hevur víst, at hann er bestur til. Eftir langa framlegging tamdi Christian Høgni bóltin, áðrenn hann snaraði um seg sjálvan, kom sær í góða støðu og smekkaði bóltin upp undir nettakið aftanfyri Símun Rógva Hansen, sum er við at mennast til sannan álitisskansa millum B71 stólparnar.

Málið hjá Christian Høgna var avgerandi. NSÍ hevði góða løtu trýst fyri at fáa sigursmálið, men marginalirnir høvdu ikki verið á teirra síðu, tá ið eitt nú innskifti Øssur Dalbúð úr góðari støðu sendi dygst skeivu megin stólpan.

Í slíkum støðum er tað, at tann, sum ætlar sær at vinna FM, skal vísa format, og tað gjørdi NSÍ. Sandoyingar vóru vónbrotnir og royndu í yvirtíðini at flyta nógv fólk fram á vøllin í vónini um, at tað skuldi eydnast at javna. Í staðin var tað ein annar av teimum, sum er fingin til Runavíkar fyri at vera við til at vinna fyrsta FM heitið til NSÍ, sum gjørdi um seg. Hjalgrím Elttør skoraði til 3-1. Hann skræddi seg leysan av verjuni og var heppin, tá ið hann royndi sjálvur ímóti málinum. Tveir viðspælarar vóru púra blankir og bíðaðu eftir bóltinum!



*Fagnaðurin var ovurstórur hjá NSÍ, tá teir enn einaferð vissaðu sær sigurin í yvirtíðini á Sandi*
*savnsmynd*

NSÍ legði seg á odda, tá ið tíggju minuttir vóru eftir at 1. hálvleiki. Málskjútti í tí førinum var Jónhard Frederiksberg. Eisini hann er komin til Runavíkar fyri at vera við til at gera NSÍ til meistara. Higartil hevur úrtøkan hjá skálamanninum ikki verið stór, um roknað verður í málum, og um sammett verður við tað, sum hann áður hevur avrikað á Skála. Men hesa ferð var Jónhard á rætta staðnum í røttu løtuni, og so beindi hann úr stuttari fjarstøðu bóltin í málið.

Sutt eftir steðgin kom rættuligt lív í aftur, tá ið B71 javnaði. Talan var um rimmar mál frá einum av ungu monnunum, sum sandoyingar royna at seta við. Eftir horna og út frá smekkaði Gudmund Nielsen í besta Drogba stíli til, og bólturin sigldi yvir mannamúgvuni í NSÍ brotsteiginum og yvir høvdinum á Jens Martini Knudsen, sum mundi síggja bóltin ov seint.

So var tað, at Christian Høgni vísti, at hann framvegis er førur fyri at taka søkina í egnar hendur, og fyri aðru ferð í ár tryggjaði NSÍ sær sigurin á Sandi í evstu løtu.

Hagtølini siga, at ein stórur partur av fótbóltsdystunum verða avgjørdir síðstu fimm minuttirnar. Tá eru tað ofta, at tað koppar teimum til fyrimunar, sum hava breidd og tyngd, og soleiðis

# Fysikkurin er fremsta orsøkin

Ofta hava vónirnar í Runavík verið stórar, men fram til í ár hava hesar tó ikki hildið allan vegin. Tí hóast NSÍ støðugt hevur verið millum fremstu liðini í skjótt nógv ár, so hevur FM-gullið enn ikki vunnið veg fram til vesprunar.

Tað eru tó ábendingar um, at 2007 kann gerast árið, har NSÍ loksins fær gullið. Ikki minst hevur liðið sýnt evni at vinna dystirnar, sum at kalla javnviga á vágskálini, og í so máta var talan um enn ein av slagnum á Sandi sunnudagin.

- Hetta gjørdist júst so trupult, sum vit óttaðust. Vit upplivdu longu í fyrsta dystinum í ár, hvussu sterkt B71 er, men at talan mest sum gjørdist um kopi av tí dystinum, vardi okkum sjálvandi ikki, sigur Óli Hansen.

Spurdur, hvør orsøkin er, til at NSÍ brádliga er farið at toga marginalarnar í sín part, heldur Óli, at orsøkin fyrst og fremst er venjingarstøðan.

- Eg haldi, at vit í ár eru betri fyri. Tað hevur heilt víst verið ein fremstu orsøkunum til, at vit einar 3-4 ferðir hava megnað at koppa dystum til okkara fyrimun móti endanum. Og tá so er, so fært tú sjálvandi eisini trúnna uppá, at tað kann eydnast.

At tosa um onnur úrslit, plagar ikki at vera góður fótbólts-siður. Men tað skerst ikki burtur, at Óli Hansen heldur úrslitið í Gundadali kom væl við.

- Tað var í øllum førum rættiliga óvæntað, og tað leggur upp til eitt ordiligt brak komandi vikuskiftið. Tað er ein dystur, sum vit gleða okkum til, men tað verður so avgjørt ikki nøkur lætt uppgáva, tí B36 hevur eitt serstakliga sterkt lið.

Og eru fólk á Runavíkarleiðini spakuliga farin at tosa um FM-møguleikan?

- Nei. Í øllum førum haldi eg, at tær vónirnar sum so eru rættiliga dempaðar mótvegis okkum spælarum. Eg veit ikki, um áskoðararnir eru vónbrotnir ov ofta, men vit kenna tað so ikki, sum liggur nakað trýst á okkum í so máta. Vit taka ein dyst í senn, og so mugu vit síggja, hvussu langt tað fer at røkka, sigur Óli.

**-mørk**